gult16 cyan16 magenta16 svart16



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Støðan hjá villum føroyskum laksi vánalig

Støðan hjá laksastovninum í Norðuratlantshavinum er framvegis vánalig og vísindaliga tilráðingin er at halda veiðuna á so lágum støði sum møguligt. Serstakliga er laksurin í sunnara økinum illa fyri. Sera nógv tiltøk eru sett í verk fyri at verja laksin, serliga av Føroyum og Grønlandi, men støðan er enn vánalig.

Hetta kom fram á 18. ársfundinum hjá NASCO (felagsskapur fyri varðveitasn av laksi í Norðuratlantshavi), íð var hildin í døgunum 4-8 juni í Mondariz, Galizia í Spaniu. Limalondini í NASCO eru USA, Kanada, Danmark, vegna Føroyar og Grønland, ES, Ísland, Noreg og Russland.

Tað er NEAFC, millumlandafelagsskapurin, sum umsitir havøkini í landnyrðingspartinum av Atlantshavi, íð ásetir laksakvoturnar. Kjartan Hoydal er skrivari í hesum felagsskapi.

Samtykt varð, at føroyska laksaveiðan í 2002 skal skipast á sama hátt sum í ár. Føroysk skip kunnu veiða ta nøgd í føroyskum sjógvi, sum veður mett at vera burðardygt fyri stovnarnar eftir tilráðing frá ICES. Tað er tí upp til føroysku myndugleikarnar at áseta ta veiðu, sum mett verður at vera skynsamt at veiða eftir fyrivarnisregluni í føroyskum sjógvi.

Arbeiði at seta fyrivarnisregluna í gildi fyri laks heldur fram, herundir eisini tær búskaparligu avleiðingarnar hjá einstaklingum og samfeløgum.




## Gólvuppboðssølan

Gólvsølan
Leygardagin seldu 15 bátar á gólvuppboðssøluni.

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 25 | Mascot | Lína | 2.838 |
| FD 256 | Aðnasker | Snella | 161 |
| FD 306 | Vesturland M/S | Gørn | 110 |
| FD 580 | Thomas Nygaard | Lína | 121 |
| FD 616 | Randi | Botntrol | 99 |
| FD 660 | Falkurin | Lína | 479 |
| FD1054 | Aldubáran | Lína | 123 |
| KG 244 | Ågot | Gørn | 336 |
| KG 349 | Polarstjørjan | Lína | 275 |
| KG 378 | Skørin | Lína | 186 |
| KG 512 | Neshamar | Snella | 326 |
| TN 396 | Báran | Snella | 19 |
| VA 214 | Vesturvarði | Botntrol | 588 |
| VA 215 | Akraborg | Partrol | 1.428 |
| VA 51 | Venus | Lína | 88 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| ANNAÐ | 16 |
| BLÁLONGA 0 | 25 |
| BROSMA 0 | 15 |
| BROSMA 2 | 12 |
| HÝSA 1 | 38 |
| HÝSA 2 | 318 |
| HÝSA 3 | 495 |
| HÝSA 4 | 45 |
| HAVTASKA 0 | 164 |
| HVASSKVOYSA | 9 |
| HVÍTINGUR 0 | 463 |
| KALVI 2 | 192 |
| KALVI 3 | 121 |
| KALVI 4 | 75 |
| KALVI 5 | 53 |
| KONGAFISKUR 0 | 614 |
| LÁLLA | 9 |
| LIRI | 81 |
| LONGA 0 | 76 |
| LONGA 3 | 15 |
| LONGA 5 | 68 |
| REYÐSPRØKA 0 | 22 |
| SKØTA | 2.016 |
| SKRUBBA | 23 |
| STEINBÍTUR | 516 |
| TOSKUR 1 | 21 |
| TOSKUR 2 | 61 |
| TOSKUR 3 | 39 |
| TOSKUR 4 | 224 |
| TOSKUR 5 | 104 |
| TUNGA 0 | 657 |
| UPSI 0 | 470 |
| UPSI 4 | 120 |




gult17 cyan17 magenta17 svart17



